# Bilar

Nr. 161 • hósdagur • 28. august 2003 • 76. árg.



*Alto innan. Alto er nú ein nýtímans bilur við servostýring, ABS bremsum og airbags*

# Nýggjur Suzuki Alto

**Nú er nakað síðan tann lítli og orkusparandi Suzuki Alto var á marknaðinum. Ein heilt nýggjur og nútímans Alto er nú komin hendan vegin. Bilurin verður gjørdur sum hatchback við fimm hurðum**



*Á bilasøluni hjá Eybjørn Hansen hava teirn nú fingið fleiri nýggjar Suzuki Alto*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

BILAR
*Magnus Gunnarsson*
*maggi @sosialurin.fo*

Suzuki eru kendir fyri sínar framkomnu motorsúkklur og smáu persónbilar og jeepar. Hóast japanska Suzuki verksmiðjan bleiv stovnað í 1909, framleiddu teir sínar fyrstu motorsúkklur í 1952 og fyrstu bilarnar í 1955.

Tann fyrri Alto varð ein nógv seldur bilur. Í øllum heiminum koyra meira enn 7 milliónir Alto, harav teir 5.000 eru í Danmark.

Eins og forgangarin verður hesin nýggi Alto gjørdur í Indien. Talan er tó um ein heilt nýggjan bil. Motorurin er eisini ein nýggjur 1,1 litur 16V við 63 hk. Tað ljóðar kanska ikki av nógvum, men tá bilurin einans vigar 775 kg, er motorurin nóg stórur og kvikur, hann koyrir frá 0-100 km/t uppá 8,3 sekund. Motorurin er bæði orkusparandi og umhvørvisvinarligur, hann koyrir 20,4 km/l (blandað koyring).

## Kappingarførur bilur

Í hesum bilinum situr man høgt og hann merkist lættur at koyra, og servostýringin virkar perfekt. Alto hevur ein vendiradius uppá einans 4,6 metrar, so hann er væl egnaður til býkoyring, og har sum lítið pláss er til at parkera.

Atlo hevur nú ABS bremsir og dupultar airbagpútur framman, trygdarbjálkar í hurðunum og 3-punkts trygdarbeltir framman og aftan.

Suzuki hevur ein stóra vøruskrá. Alto er tann minsti Suzuki, síðan kemur Wagon R, so tann gamli Swift, Ignis, Baleno, og Liana. Síðan koma jeeparnir Jimny, og Grand Vitara, sum verður gjørdur í trimum støddum. Við einum prísi líka oman fyri hundrað túsund krónur verður nýggi Alto avgjørt ein kappingarførur bilur í sínum klassa.



*Suzuki Alto fæst nú sum hatchback við fimm hurðum*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

## Suzuki Alto 1,1 – 5/h

| | |
|---|---|
| Motorurin: | 1,1 litur 16V bensin við 63 hk |
| 0-100 km/t: | 8,3 sek |
| Bensinnýtsla: | 20,4 km/l |
| Dekstødd: | 155/65-13 |
| Stødd og vekt | |
| Longd: | 349,5 cm |
| Breidd: | 147,5 cm |
| Hædd: | 146,5 cm |
| Egínvekt: | 775 kg |
| Totalvekt: | 1.175 kg |
| Viðførisrúm: | 177 litrar |
| Prísur: | kr. 105.000,- |
| Søluumboð: | P/F Eyðbjørn Hansen<br>Varðagøta 75<br>FO-100 Tórshavn<br>Tel. 313375<br>e-mail: suzuki@suzuki.fo |



# BILATORGIÐ

**Føroyski brúktbilamarknaðurin - í Sosialinum hvønn hósdag**

Fyrivarni verður tikið fyri villum



**HYUNDAI ACCENT**
Árg jun. 1995, Km 135.340.
sýnaður 10.des. 2002. Kr. 45.000.



**VW PASSAT 1,8**
Árg feb. 1989, Kr. 29.000.



**RENAULT MÉGANE**
Árg okt. 1996, Km 10.300.
Kr. 75.000.



**SUZUKI BALENO 1,3 GL**
Árg Mar-99, Kr. 75.000.



**CITROËN XANTIA**
Árg jan.1997, Kr. 75.000.



**MAZDA 121**
Árg aug.1988, Kr. 14.000.



**MAZDA E2200 DIESEL**
Árg jun. 1996, Kr. 45.000.

SUZUKI
Spf. Eyðbjørn Hansen • Varðagøta 75 • 100 Tórshavn
tel 31 33 75 • faks 31 14 95 • www.suzuki.fo • suzuki@suzuki.fo



**CITROEN ZX 1.4I 5H**
Árg Jul-95, Km 58.000. Kr. 49.000 .



**NISSAN MICRA 1.1 5H**
Árg Sept. 1999, Km 45.000.
*Prísur fyrr Kr. 73.000 –*
**Nú** Kr. 69.000 .



**MITSUBISHI L300 COSMOS 2.5D VAN**
Árg Mai 1995, Km 113.000.
Kr. 76.000 .



**SKODA OCTAVIA 2.0TD STC. VAN**
Árg Mar-00, Km 104.000. v/mvg.
Kr. 115.000 .



**CITROEN ZX 1.9D STC.**
Árg Feb-96, Km 160.000.
Kr. 58.000.



**RENAULT MEGANE 1.6I STC**
Árg Nov. 1999, Km 26.000.
Kr. 118.000 .



**NISSAN SERENA 2.3D VAN**
Árg Mai 1997, Km 88.000. v/mvg.
Kr. 88.000.
**Nýsýnaður Aug.2003**



**TOYOTA HIACE 2.4D-TURBO AUT.**
Árg Mai 1999, Km 104.000. v/mvg.
*Prísur fyrr Kr. 150.000 –*
**Nú** Kr. 140.000 .
**Sýnaður 2003**



**CITROEN XSARA 2.0HDI 5H**
Árg Jun-00, Km 38.000.
Kr. 140.000 .



**TOYOTA AVENSIS 2.0TD 4H**
Árg Mar-98, Km 124.000.
Kr. 135.000 .

CITROËN Mercedes-Benz MITSUBISHI MOTORS
Ivan Johansen Bilar
Tel 313666 • www.ivan.fo •e-mail: ivan@ivan.fo



**MERCEDES-BENZ 190 D - 2,0 DIESEL**
Árg 1989, Km 270.000. Bilurin er í góðum standi, koyrir 15,0 km/l.
Kr. 75.000.
**tel. 447175 ella 217175**




## 7 PERSÓNA FAMILJUBILUR



**MERCEDES BENZ 230 TE**
Árg 1991, Km 118.000. Rúmligur 7 persóna familjubilur til sølu. Bilurin er í sera góðum standi. Nýsýnaður, eyka felgur fylgja við, nýtt útstoyt (komplett), nýggjur akkumulator, nýggjar bremsuskivur framman og nýggir el-rútavindarar. Søluprísur kr. 149.000. Nærri upplýsingar fáast við at ringja á tlf. 216135 . .



**VW CARAVELLE - 10 PERS.**
Árg jan. '01, Km 68.000.
**Gev eitt boð.**

VOLVO RENAULT
VR BILAR
Hoyvíksvegur
tel 322110

